

Nr. 3 ***31. januar 2027*** **87. árg.**

Halt á at biðja og trúgva

„Biðið uttan íhald!“ 1. Tess. 5,17.

Gjøgnum alla lívstíð sína bað bretski evangelisturin George Müller (1805 – 1898), Gud um pengar at metta síni foreldraleysu fosturbørn á Ashley Down barnaheiminum. Gjøgnum øll hesi ár bleiv tað til 7,5 milliónir dollarar, í nútíðar peningi eru tað 113 milliónir dollarar. Hann helt ikki, at tú alment skuldi tosa um tín peningaliga tørv, men kortini hevði hann altíð nóg mikið, so hann fekk goldið sínar handilsrokningar – av tí at tað tók Gud sær av á yvirnatúrligan hátt.

Men trúgvin hjá Mülleri varð roynd á annan hátt. Til dømis bað hann regluliga fyri fimm monnum, sum hann av hjarta ynskti at vinna fyri Kristus. Fyrsti maðurin gav Kristusi lív sítt eftir 5 árum, annar og triði eftir 10 árum og hin fjórði eftir 25 árum. Men soleiðis er tann persónurin, sum stríðist: Müller bað í heili 52 ár, áðrenn fimti maðurin vendi um!

Tað var veruliga so, at hesin maðurin játtaði trúgv sína á Kristus fáar mánaðir eftir, at Müller var farin til gravar. Vilt tú biðja um okkurt í 52 ár uttan at hóma eitt svar?

Tað eigur tú at gera, og tú skalt!

Müller plagdi at siga: „Gud gleðir seg, tá ið hann kann økja um trúnna hjá børnum sínum.“ Staðin fyri at vænta okkum royndir, áðrenn vit vinna ein sigur, ella at vænta okkum venjingar í at vera tolin, so áttu vit heldur at tikið ímóti teimum frá Gudi sum eitt amboð. Royndir, forðingar, tvørleikar og av og á ósigur er føðin hjá sjálvari trúnni.

Um tú biður og spyrst Gud: „Vilt tú?“ Er svar hansara: „Eg vil!“ Sálmur 91,15 sigur: „Kallar hann á meg, eg honum svari,

í neyðum eg hjá honum eri. Eg hann frelsi og veiti honum æru.“ Og í Jeremia 33,3 V. D. sigur Gud: „Rópa til Mín, og Eg skal svara tær, og Eg skal kunngera tær tað, ið stórt og ófatandi er, slíkt sum tú kennir ikki!“

So orðið til tín í dag er – halt á at biðja og trúgva.

„… et Ord til Dagen“ – Effie Campbell umsetti.

Irena, ein megnarkvinna

Tá ið eg las um jødakonuna Irenu, komu hesi orðini hjá Jesusi fram fyri meg: „Størri kærleika hevur eingin enn tann, at hann letur sítt lív fyri vinir sínar.“ Jóh. 15,13.

Irena doyði í 2009, 98 ára gomul. Hon varð borin í heim í Týsklandi og var útbúgvin blikksmiður. Hon arbeiddi í jødabýlinginum í Warszawa. Sum týskur jødi var hon greið um, hvat ið tað var, sum fór fram.

Hon fór undir at smugla jødisk pinkubørn út úr ghettoini. Hon goymdi tey niðri á botni í sínum amboðskassa. Tey eitt sindur størri børnini goymdi hon í einum stórum ryggsekki og setti hund sín omaná. Hann goyði illa eftir teimum nasistisku hermonnunum, tá ið hon eftir loknan arbeiðsdag fór úr leguni og út gjøgnum portrið.

Tað, at hundurin goyði so illa, gjørdi, at vaktarmenninir kannaðu ikki ryggsekkin. Á henda hátt bjargaði hon 2.500 pinkubørnum og eitt sindur størri børnum.

At enda komu vaktarmenninir kortini framá, hvat ið tað var, hon tókst við, og teir brutu bæði armar og bein í henni og smurdu hana av.

Irena skrivaði nøvnini niður á øllum børnunum, sum hon smuglaði út. Hon goymdi listarnar í einari súltutoyskrukku, sum hon gróv niður undir einum træi í urtagarðinum.

Eftir kríggið gróv hon krukkuna upp. Hon royndi at sameina tey fáu foreldrini, sum komu livandi úr jødabýlinginum, við børn teirra. Restina av børnunum fekk hon inn í fosturheim ella fekk fólk at ættleiða tey.

Í 2008 var Irena í uppskoti at fáa nobelheiðursløninа. Men tað gjørdist Al Gore, sum fekk hana vegna sínar hugsanir um globalu upphitingina. Nei, tey, sum hava uppiborið tað, fáa ikki altíð heiðursmerki. Men tíbetur eru tað hetjur mitt í okkara

gerandisdegi. Irena var ein teirra. Hon vísti sannan kærleika og var ein teirra, sum Jesus tosar um, tá ið hann sigur: „Størri kærleika hevur eingin enn tann, at hann letur lív sítt fyri vinir sínar."

Nobelnevndin helt ikki, at Irena var verd eitt heiðursmerki. Men man Irena ikki hava fingið eitt hjartaligt lógvatak, tá ið hon steig innum heima hjá Jesusi.

Effie Campbell umsetti.

Fráfallin

Tveir trúgvandi menn sótu og tosaðu um trúnna. So sigur annar: „Hvussu ber tað til, at summi, sum vóru so brennandi undir vekingini í 70-árunum, ongantíð sóust aftur, hví fullu tey frá?"

„Ja," svaraði hin, „vit lesa í 1. Tim. 4,1: – Men andin sigur beinanvegin, at í komandi tíðum skulu summir **falla frá trúnni** og halda sær at villandi andum og lærdómum av illum andum.

Men eg skal siga tær, hví tey kólnaðu og fullu frá. Í 3. Mós. 6,6 stendur: „Eldurin skal altíð brenna á altarinum; hann má ongantíð kólna út," og í 5. v. stendur, at hvønn morgun mugu tey leggja við aftur at eldinum, so hann ongantíð kólnar út.

Soleiðis var tað í Gomlu Pakt, í Nýggja Testamenti er Guds orð, Bíblian, tann viðurin, sum heldur eldin brennandi. Hvønn dag skulu vit lesa eitt petti úr Skriftini, so okkara hjartaeldur ikki slóknar."

Effie Campbell.

Sæð uppi í KFUK:

Bøn – Sant Patrik

Gævi Kristus gongur undan tær sum leiðvísi tín.

Gævi Kristus gongur tær við lið sum verndari tín.

Gævi Kristus gongur aftan fyri teg og varðar teg.

Gævi Kristus gongur undir tær at lofta tær, skuldi tú dottið.

Gævi Kristus er í tær og fyllir teg við anda sínum.

Gævi Kristus er um teg og varðveitir teg frá øllum illum.

Gævi Kristus er yvir teg og signar teg.

Upp úr veitunum – inn á vegin

Moses Hansen

Upp úr veitunum – inn á vegin – **JESUS ER VEGURIN.**
Vit eru frelst av **GUDS NÁÐI –**
verða varðveitt av **GUDS NÁÐI –**
eydnast við **GUDS NÁÐI.**
Gud hevur eingi fullkomin menniskju at senda
út at arbeiða við innheystingini.
Ábraham leyg –

MEN GUD BRÚKTI HANN.
Jesaja var maður við óreinum vørrum –

MEN GUD BRÚKTI HANN.
Pætur bannaði uppá, at hann ikki kendi Jesus –

MEN GUD BRÚKTI HANN.
Dávid dreiv hor og drap mann hennara –

MEN GUD BRÚKTI HANN.
Paulus blakaði tey trúgvandi í fangahús –

MEN GUD BRÚKTI HANN.

Tá ið farisearnir førdu konuna, sum var tikin í hori, til Jesusar og við mongum orðum ákærdu hana, segði Hann: **„TANN AV TYKKUM, SUM SYNDALEYSUR ER, KASTI FYRSTUR STEIN Á HANA!“** (Jóh. 8,7). So søgdu teir ikki meir, men smoygdu sær burtur.

„Tí hyggi tann, sum heldur seg standa, um seg sjálvan, at hann ikki fellur.“ (1. Kor. 10,12).

Effie Campbell umsetti.


Ein ideologi er ein trúgv – í orðum – við munninum og skilinum – men uttan hjarta og lív. Ein frelsandi trúgv er virksom í kærleika. Gal. 5,6

e.c. ums.

SUNNUDAGSSKÚLIN

31. jan.	**Tekstur:** Mark. 2,1-12	**Bíbliuorð:** Matt. 25,40b
7. febr.	**Tekstur:** Matt. 4,1-11	**Bíbliuorð:** Matt. 4,10b

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
Umbróting & prent: Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74



Nr. 4 ***14. februar 2027*** **87. árg.**

Finn onkran at biðja saman við – biðið í einleika

„Tí at hvar sum tveir ella tríggir eru komnir saman í mínum navni, har eri eg mitt ímillum teirra.“ Matt. 18,20.

Becky Smith var 84 ára gomul, og systir hennara var 82. Við árunum var onnur vorðin blind, og hin var vorðin so kryplað, so at tær ikki longur sluppu í kirkju. Kirkjan hevði kortini brúk fyri teimum. Tær búðu á oynni Lewis vestan fyri sjóvarstrond Skotlands, og heimbygd teirra, Barvas, var merkt av andaligum myrkri. Meinigheitin misti limir, og ungdómurin spottaði trúnna og tosaði um umvending, sum var tað pestur.

Í oktober 1949 mælti „Tann fría kirkjan í Skotlandi“ limum sínum at biðja. Men hvat kundu tvær eldri systrar, sum ikki vóru førar fyri at fara heimanífrá, gera? Rættiliga nógv, hildu tær. Tær broyttu smáttu sína til eitt bønhús – opið og virksamt alla náttina.

Frá kl. 22:00 til kl. 4:00 tvær nætur um vikuna bóðu tær Gud vísa bygd teirra miskunnsemi. Eftir fleiri mánaðum segði Becky við systur sína Christine, at Gud hevði sagt hesi orð við seg: „... tí at eg man hella út vatn yvir tað tystandi land og áarstreymar yvir turrlendið...“ Jes. 44,3.

Hon mælti presti sínum til at stíla fyri einum vekingarmøti og bað hin kenda evangelistin, Duncan Campbell, koma at tala. Tá ið Campbell ikki vildi koma, helt hon fast við, at hann kortini fór at koma. „Gud sigur, at hann kemur, og hann kemur her um tvær vikur.“ Og tað hendi!

Í fimm vikur prædikaði Campbell hvørja nátt til stórar fólkaskarar kl. 19:00, kl. 22:00, kl. 24:00 og kl. 03:00. Syndarar

vórðu umvendir, vertshús lótu aftur, tí eingin kom á gátt har, og oyggin Lewis merkti Guds nærveru – alt av tí at tvær konur bóðu í einleika.

„... et Ord til Dagen“ – Effie Campbell umsetti.

Bíbliu-lyfti

Tann, sum ikki lesur dagliga í Bíbliuni, tornar upp innan, og tað andaliga lívið doyr. Bíblian er sum ein skattakista, full av lyftum. Her eru fýra lyfti.

Um tú ert bangin, les so Jesaja 41,10: „Óttast ikki, tí at eg eri við tær, lat ikki hugin bila tær, tí at eg eri Gud tín.“

Heldur tú, at **eingin er góður við teg**, les so, hvat ið Gud sigur í Jesaja 43,4: „Tú ert mær dýrmætur, mikilsverdur og kærur.“

Hevur tú ein trupulleika, les tá 1. Pæt. 5,7: „Kastið alla sorg tykkara á hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum.“

Ert tú keddur? Les meðni Sálm 37,4: „So skalt tú í Harranum hava gleði tína, og hann man tær geva tíni hjartans ynski.“

„Fokus på barnet“. – Effie Campbell umsetti.

Mefibósjet slapp at sita við borð kongsins

Hans Martin Skagestad

Ein frásøgn í Bíbliuni hevur gripið meg. Hon vísir okkum, hvør ið Gud er. Tað er søgan um Mefibósjet, hann, sum gjørdist lamin sum barn. Hann flýddi, knústur og fátækur. Ja, uttan nakra vón.

Mefibósjet hevði einki virði, hvørki í egnum eygum ella hjá øðrum. Dávid vildi fegin vísa kærleika til onkran í ætt Sauls. Mefibósjet var sonur Jónatan og abbasonur Sauls. Hann varð borin fram fyri Dávid, men Dávid sá okkurt meir enn bara hansara lamni.

Júst soleiðis er tað við Gudi. Hann sær ikki soleiðis sum menniskju síggja. Gud hyggur ikki at tí ytra, Gud hyggur at hjartanum. Dávid sigur um Mefibósjet: „Hann skal eta við borð mítt!“ Sjálvt um onnur hildu, at tað var hann ikki verdur til, segði Dávid, at hann skuldi eta við borð kongsins.

Vit eru øll sum Mefibósjet, og ikki nokk við tað. Mefibósjet skuldi vera sum ein av sonum Dávids. Kanska var hann bangin.

Hann, sum hevði kent seg forfjónaðan og settan uttanfyri alt lív sítt. Á ein hátt eru vit øll sum Mefibósjet, vit hava okkara avmarkingar, niðurboygd og hjálparleys av tí, sum lívið hevur gjørt við okkum.

Men sannleikin er jú, at Gud bjóðar okkum at sita við sítt borð. Uttan mun til okkara brek og manglar. Viðhvørt kann eg kenna meg óverdugan at sita við borð hansara. Men Jesus ber okkum til borð sítt, har vit øll hoyra heima.

Okkara veikleiki verður fjaldur av hansara góðsku. Við borð hansara eru vit ikki longur skúgvað til viks. Har eru vit hansara.

Effie Campbell umsetti.

Ein konfirmasjónssøga

Ein prestur greiðir frá:

Einaferð hevði eg millum mínar konfirmantar ein drong, sum var so ráur og ljótur í munninum, at hann fann ikki sín líka. Hann gjørdi tað, at eg ofta misti tolið, tíverri.

Bara einaferð blotnaði eg um hjartað, tað var, tá ið eg eftir konfirmasjónina segði honum farvæl. Hann skuldi til skips. Tá segði eg við tárum í eygunum: „Eg havi ein varhuga av, at tú fert at koma í nógva trongd og dýrastu neyð; men um so verður, hugsa so um, góði, at eisini tú kanst leita til Frelsarans, og at hann leingi hevur bíðað eftir tær."

Drongurin fór avstað at síggja til líka kaldur, sum hann var komin.

So gingu nøkur ár. Eitt sunnukvøld hevði eg gudstænastu. Eg sat í sakristinum og fyrireikaði meg at fara upp á prædikastólin. Alt í einum kom ein stásiligur ungur sjómaður inn til mín. Við øgiligari ferð kom hann beint yvir ímóti mær, tók um hendur mínar so fast, at eg kundi havt skríggjað, og spurdi: „Kenna tygum ikki meg aftur? Tygum eiga lívið í mær, og tygum at takka eri eg sælur."

Hetta var júst tann illavorðni drongurin, sum eg havi greitt frá omanfyri. Stundir vóru ikki til nógv orð, tí tá ið sálmurin var sungin at enda, skuldi eg á prædikastólin, og mín matrósur skuldi kvika sær oman á bryggjuna. Við fáum orðum segði hann mær um sínar ferðir og vandar, um sínar líðingar og gleðir. Avsmurningar og hørð orð høvdu í langa tíð verið dagliga breyð hansara. So ein dagin brast ein øgilig ódn á.

Skipið fórst, næstan øll manningin sjólætst, og mín neyðars drongur rak í tvey samdøgur á havinum á einari tunnu. Hvørja løtu væntaði hann, at brotasjógvarnir tóku seg.

„Hesa ræðuligu tíð," segði hann, „hugsaði eg um tað, tygum, kæri prestur, høvdu sagt við meg, tá ið vit skiltust." Og hann endurtók nú orðarætt og við táravátum eygum tað, sum eg hevði sagt við hann. „Ja, frá tí degi havi eg biðið dag og dagliga, og eg veit nú eisini, at eg havi ein Frelsara, og eg eri so eydnusamur."

Vit grótu báðir, og eg hálsfevndi henda stásiliga mannin, tá ið vit søgdu farvæl.

Kirkjuliðið var longu farið at syngja seinasta versið. Eg noyddist at fara á prædikastólin, og hann tuskaði oman á bátin. Og hvør veit, á hvørjum havi hann nú rekst. Men eg eri eydnusamur.

Hvar tann ungi maður enn man vera, og um eg kanska ongantíð fari at síggja hann aftur á hesi jørð – so havi eg ta rimmarføstu sannføring: Harrin hevur vunnið hann!

Gerh. Haaland, „Himmelveien".
Effie Campbell umsetti.

Samanbering og morðsnigil

Thomas Åleskjær

Vit eru ofta ávarað móti samanberingini. Men hon kemur sníkjandi aftur, sum morðsniglarnir í urtagarðinum. Brádliga er hon har – uttan at tú veitst, hvaðani hon er komin. Slímut og kvirr ekur hon seg fram, og á leiðini leggur hon alt í oyði, sum varð ætlað at blóma.

Á sama hátt oyðetur samanberingin alt, sum var ætlað at vaksa í „okkara hjartans urtagarði".

Tú ert tú, og eg eri eg, og vit skulu ikki samanbera okkum, men brúka tær talentirnar, tær gávurnar vit hava fingið.

Effie Campbell umsetti.

SUNNUDAGSSKÚLIN

14. febr.	**Tekstur:**	1 Mós. 30,22-24; 37,1-28	**Bíbliuorð:**	Róm. 2,11
21. febr.	**Tekstur:**	1 Mós.39,1-6+19-23; 41,1a+14-43	**Bíbliuorð:**	Jes. 41,10c

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
Umbróting & prent: Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74